# Fleiri óútbúnir læknar settir á Landssjúkrahúsinum

*Hví vil Almanna- og Heilsumálastýrið ikki seta kirurg á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, hóast umsøkjari er. Klaksvíkar sjúkrahús hevur ongan kirurg í løtuni? vil Jógvan við Keldu hava at vita í fyrispurningi*



ÓLAVUR Í BEITI

Tingmaður fólkafloksins í Norðoyggjum, Jógvan við Keldu, hevur sett Helenu Dam á Neystabø fyrispurning, og vil hann hava at vita, hvussu tað ber til, at meðan Almanna- og Heilsumálastýrið bólgnar av fólki (kanska úr einum 8 upp í eini 40 fólk upp á nøkur fá ár), so bara vaksa trupulleikarnir í sjálvum verkinum? Hvussu ber tað til, at sjúkrahúsleiðarin á Landssjúkrahúsinum ger tað truppult hjá yvirlæknum at ferðast millum sjúrkahúsini? Hvussu ber tað til, at landsstýrismaðurin í heilsumálum íðiliga – fyri ikki at siga dagliga – nevnir, at bæði tól og peningur tørva á Landssjúkrahúsinum, meðan hon ikki tosar um sama trupulleika á Suðuroyar- og Klaksvíkar sjúkrahúsi, hóast sama er galdandi har? Og at enda spyr Jógvan við Keldu, um tað er so, at so at siga allir deildarleiðarar í Almanna- og Heilsumálastýrinum koma av Landssjúkrahúsinum?

**Ongan góðan**

Í viðmerkingunum til spurningarnar, sigur Jógvan við Keldu, at síðani sjúkrahússtýrini vórðu niðurløgd, er tað komið meiri og meiri til sjóndar, at tey bæði smærru sjúkrahúsini tykjast at vera uttan fyri áhuga hjá landsstýrismanninum í heilsumálum og Almanna- og Heilsumálastýrinum sum heild. Hesi eiga ongan góðan har. Hetta vísir, sum so mangan fyrr nevnt, at sjúkrahússtýrini vórðu til einkis gjørd við tí fyri eyga, at lættari varð at niðurleggja tey smærru sjúkrahúsini og gera hesi vápnaleys.

– Seinastu 30 árini hava stórir samstarvs trupulleikar verið á Landssjúkrahúsinum, og seinnu tíðina hava hesir ikki verið minkandi, heldur øvugt. Hetta hevur elvt til, at nógvur peningur hevur verið og verður framvegis nýttur, sum samsvarandi viðgerðir ikki fáast fyri.

– Nú eru vit komin hagar, at sjúkrahúsverkið sum heild má og skal takast upp. Tá talan er um sjúkrahúsverkið, er vónandi talan um, at tey smærru sjúkrahúsini sleppa undan álopum úr Almanna- og Heilsumálastýrinum, samstundis sum álagt eigur at verða, at viðurskiftini á Landssjúkrahúsinum mugu takast upp frá botni av.

– Bara fyri at geva tað eina dømið um álop kann nevnast, at hóast umsøkjari er til starv sum kirurgiskur lækni á Klaksvíkar sjúkrahúsi, vil Almanna- og Heilsumálastýrið ikki seta hann. Tað eigur at verða lagt afturat, at fleiri læknar eru settir í føroyska sjúkrahúsverkinum, t.v.s. eisini á Landssjúkrahúsnum, sum ikki eru endaliga útbúnir. Onkur teirra hevur heldur ikki verið serlækni, sigur Jógvan við Keldu m.a. í viðmerkingunum til fyrispurningin.

*Jógvan við Keldu,*
*løgtingsmaður*
*Fólkafloksins*

# Framleiðarar av sjómati skulu lúka ásettu krøvuni

*Tí verður skipað fyri skeiði til tess at bøta um og menna teoretiska og praktiska førleikan í uppbygging, íverksetan og umsiting av innaneftirlitskervinum fyri matvøruframleiðandi virkir, skrivar Vinnuhúsið í tíðindaskrivi*

Føroysk fiskavirkir og verksmiðjuskip hava í nøkur ár arbeitt við innanftirliti og nú er møguleiki at útvega sær, dagføra og endurnýggja neyðuga kunnleikan á økinum, tí nú verður aftur skipað fyri skeiði í innaneftirliti fyri føroysk fiskavirkir og verksmiðjuskip. Hesaferð er tað Fiskivinnuskúlin í Vestmanna, sum stendur fyri at samskipa skeiðið.

Innaneftirlitið tekur støði í kunngerð nr. 24 frá 4. mars 1994 um innaneftirlit á føroyskum fiskavirkjum og verksmiðjuskipum og skal tryggja, at framleiðarar av sjómati lúka ásettu krøvuni í matvørulógini.

Skeiðið verður skipað í trimum eindum og til ber at melda seg til eina, tvær ella allar tríggjar eindirnar: Eind 1. Heilsufrøðilig viðurskifti 31. jan., 1 og 2 feb.2000, Eind 2. HACCP 14., 15. og 16 feb. 2000 og Eind 3. Íverksettan og viðlíkahald av innaneftirlitinum 28., 29. feb. og 1. mars 2000

**Bøtu um**

Endamálið við skeiðinum er at bøta um og menna teoretiska og praktiska førleikan í uppbygging, íverksetan og umsiting av innaneftirlitskervinum fyri matvøruframleiðandi virkir.

Skeiðið er ætlað stjórum, góðskuleiðarum og starvsfólkum, sum saman við góðskuleiðara hava ein virknan leiklut í innaneftirlitsarbeiðnum á fiskavirkjum, kryvjivirkjum, verksmiðjuskipum o.ø.

Undirvíst verður m.a. í: smáverulívfrøði, framleiðsluumhvørvið, reingerð, sjálvrøkt, vandamálsgreining, góðskuskoðan, skjalastýring, uppbygging og íverksetan av innaneftirliti.

Skeiðið verður hildið á Hotel Føroyum og tey, sum undirvísa á skeiðnum eru: Janet F. Johannesen, Guðrið Andorsdóttir, Rakul B. Joensen, Dánjar K. Christiansen, Birna Mørkøre, Rókur í Jákupsstovu, Laila Jacobsen og Jákup Egholm Hansen.



savnsmynd



## Í býin - altíð eitt stað at fara


Streymoy

Kaggin
Friggjakvøldið spælir JAMES OLSEN BAND
Upptøkan av nýggjum limum verður friggjakvøldið kl. 22.00
Leygarkvøldið spæla SJEY
Kaggin
www.kaggin.fo

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN DIESEL KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO 311234

Manhattan PUB & CAFÉ
Opið er:
Mán. - hós.: 17.00 - 24.00
Frí.: 17.00 - 02.00
Ley.: 17.00 - 03.00
Sun.: 17-00 - 24.00
CERES FAXE
Manhattan PUB & CAFÉ
Sverrisgøta • Tórshavn
Tel 31 96 96

Casablanca
FRÍGGJAKVØLDIÐ 21.01 KL.23.00-03.30
DISKOTEK
GINNA MIDJORD FRÁ ÚF SKIPAR FYRI
Casablanca

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið harvit hittast
***

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 22/1
"FRITS" vendir plátum
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

fk Mat-seðilin
Hósdagin 20. jan. Suppukjøt
Fríggjadagin 21. jan. Beefsteak
Leygardagin 22. jan. Háryggur
Mánadagin 24. jan. Gjørd hara
Týsdagin 25. jan. Stoktan fisk
Mikudagin 26. jan. Hamburgararyggur
Kostnaður 30,- kr
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

sosialurin Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

TAXA
MINI BUSS 3X21

Halt sosialin

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin


### Vilja tygum vi› í

### Í b‡in - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum ***í b‡in***, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur